## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og stundum regn. Út á seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin upp í ein strúk av suðri og stundum regn. Seinnapartin andøvsgul av vestri og sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og mánadagin okkurt ælið, partvís vátaslettingur, men týsdagin turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

# 12.487 krónur fyri brúnna um Sandá

*Nógv er broytt, síðani Vilhelm Tórsheim í 1926 legði síðstu hond á brúnna um Sandá í Havnardali. Brúgvin, sum hevur tænt væl og leingi, stendur nú sum eitt minni um raskar grótmenn og dygdar handverk*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



**Brúgvin um Sandá hevur tænt fyri seg. Bæði høgur og lágur hevur nýtt hesa farbreyt millum vesturbygdirnar í Suðurstreymi og Havnina. Í 1926 var hon spádd at halda til ævigar tíðir – men nú hon rakk sínum lívskvøldi, fekk hon frið**

SAMFERÐSLA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fyrr í vetur varð bærilig farbreyt tikin í nýtslu gjøgnum Havnardal, tvørtur um Sandá til vesturbygdirnar. Hóast gamla farleiðin tykist neyðarslig í mun til nýggja og breiða vegin, so hevur gamla farleiðin til Kirkjubíggjar tænt fyri seg í næstan áttati ár.

Tað var tann 25. apríl í 1925 – dagurin, ið seinni varð til flaggdagin – at Dimmalætting kunngjørdi úrslitið av lisitatiónini um at gera brúnna um Sandá. Fimm tilboð komu inn, og tað lægsta átti Vilhelm Samuelsen í Havn, sum seinni fekk sær navnið Tórsheim. Hann beyð sær til at gera arbeiðið fyri 12.487 kr.

Hinir fýra, ið buðu upp á arbeiðið, vóru Johannes Simonsen, 24.300 kr, Óli Arge, 21.982 kr, Chr. Jensen í Kvívík, 16.850 kr og Jacob Christiansen, 14.840 kr.

Tíðliga hetta árið – í 1925 – verður loyvi givið til at koyra torv eftir tí, ið liðugt er av vegnum úr Havn til Kirkjubøar. Hetta er áðrenn brúgvin er gjørd, so koyrt hevur verið um ánna, um hetta hevur verið neyðugt.

Tingakrossur skrivar í februar 1926, at nú er koyrandi úr Havn til Velbastaðar og Kirkjubøar.

»Sunnudagin koyrdu heilir tveir bilar fullir av fólki fyri fyrstu ferð úr Havn til Kirkjubøar. Tað gekst heldur vánaliga, í støðum var vegurin so bleytur, at fólkið mátti fara av vagnunum og draga teir eftir sær…«

Greinskrivarin heldur fyri, at tað verður bert í terraveðri um summarið og í frosti, at hesir vegir verða nýtandi til koyrslu.

Í einum seinni blað hetta várið verður kortini skrivað, at vegurin ikki er so galin kortini, at hann er steinsettur og ein tann besti í Føroyum.

Fyrsta árið var kortini okkurt galið við brúnni, tí í juli í 1926 verður brúgvin um Sandá stongd, og sambært lýsing frá VBV í oktober er brúgvin opin aftur. Tá skrivar Tingakrossur um bilaferðsluna millum Havnina og Velbastað og Kirkjubø – »ið so leingi hevur verið forðað av hesi vanlukku brúgv, er um síðir aftur komin í rættlag«

Og so verður lagt afturat: »Brúgvin sigst nú at skula halda til ævigar tíðir«.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 11 |
| Tromsø | ÷5 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷6 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | ÷18 |
| Moskva | ÷13 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷5 |
| Kiev | ÷13 |
| Bukarest | ÷2 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 9 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 33 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 995 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




Hátrýstið yvir Onglandi fer spakuliga norðureftir og verður skamt eystanfyri Føroyar leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/02 kl. 06⁰⁰– 12/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 11/02 kl. 06⁰⁰–12/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 67,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. februar: Seinna kvarter
16. februar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. feb | — | 12.10 | 11.10 | 23.49 | 11.25 | — | 01.33 | 14.10 | 02.33 | 15.10 | 10.25 | 23.04 | 09.25 | 22.04 | — | 12.25 | 00.48 | 13.25 | 11.55 | — | 00.33 | 13.10 |
| 14. feb | 00.49 | 13.28 | — | 12.28 | 00.04 | 12.43 | 02.49 | 15.28 | 03.49 | 16.28 | 11.43 | — | 10.43 | 23.10 | 01.04 | 13.13 | 02.04 | 14.43 | 00.34 | 13.13 | 01.49 | 14.28 |
| 15. feb | 01.55 | 14.22 | 00.55 | 13.22 | 01.10 | 13.37 | 03.55 | 16.22 | 04.55 | 17.22 | 00.10 | 12.37 | 11.37 | — | 02.10 | 14.37 | 03.10 | 15.37 | 01.40 | 14.07 | 02.55 | 15.22 |
| 16. feb | 02.50 | 15.19 | 01.50 | 14.19 | 02.05 | 14.34 | 04.50 | 17.19 | 05.50 | 18.19 | 01.05 | 13.34 | 00.05 | 12.34 | 03.05 | 15.34 | 04.05 | 16.34 | 02.35 | 15.04 | 03.50 | 16.19 |

5 707265 100050